# ÍSLAND - FØROYAR

*5.-8. juni 2003*

Íroknað prísinum er:

Flogferð Føroyar-Ísland t/r v/ferðaavgjøldum · Hotel í 3 nætur v/morgunmati

Atgongumerkið til dystin Ísland - Føroyar

## Prísur: 4.995,-

Tilmelding hjá 12. manni á tel 213 212 ella hjá MB-Tours á tel 32 21 21

MB-TOURS



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3494
**Navn:** Sp/f SRI
**Adressa:** 370 Miðvágur
**Kommuna:** Miðvágs Kommuna
**Stovningardato:** 16.01.2003
**Viðtøkudato:** 16.01.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Sritharan Sivanantham. Jacobsen, 370 Miðvágur.
**Stjórn:** Sritharan Sivanantham Jacobsen, 370 Miðvágur.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Højmose, v/ Børge Christiansen, í Heiðum, 370 Miðvágur.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 16.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at selja máling og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 23. januar 2003*

*Kristin Balle*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki at byrja beinan vegin til vanligt viðlíkahaldsarbeiði í sambandi við veg- kloakk og vatnarbeiði í Kollafirði.

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Snarskivuna á tlf. 315160.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir 2 arbeiðsfólkum at byrja beina vegin, til vanligt viðlíkahaldsarbeiði í Havnini.

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Snarskivuna á tlf: 315160.

SNARSKIVAN

# Eftirlýsing!




**Landsins lagaligasta brúktbilafígging við 20% útgjald, og restina tosa vit um.**




**BMW 316i** Árg. 09/95 km. 132.000 Útgjald 30.000 / 150.000

**OPEL Vectra 1,7 T/D** Árg. 03/97 km. 123.000 118.000 Fígging práta vit um

**MAZDA 626 2,0** Árg. 08/92 km. 131.000 Útgjald 18.000 / 80.000

**AUDI A6 V6** Árg. 11/95 km. 117.000 Útgjald 33.000 / 165.000

**SUZUKI ALTO 1,0** Árg. 04/99 km. 55.000 Útgjald 13.000 / 65.000

**FORD Courier 1,8D** Árg. 05/94 km. 136.000 Útgjald 11.000 / 55.000

## TILBOÐ NÚ
## SPAR 20.000




## DAEWOO Leganza
Árg. 04/99 km 41.000 litt svartur
Fyrr 138.000 **NÚ 118.000**




**FORD ESCORT 1,8D** Árg. 05/91 km. 95.000 Útgjald 13.000 / 65.000

**BMW 318i Cabrio** Árg. 04/91 km. 184.000 KONTANT 90.000

**OPEL Omega 2,5 TD** Árg. 11/94 km. 140.000 Útgjald 33.000 / 165.000

**BMW 520i** Árg. 08/90 km. 152.000 Útgjald 24.000 / 118.000

**FIAT PUNTO 60S** Árg. 09/98 km. 58.000 Útgjald 16.000 / 78.000

**Mitsubishi Lancer** Árg. 07/89 km. 207.000 Útgjald 9.000 / 42.000

# Bilfríðkan við Velbastaðvegin

Tlf 317300 - Fartelefonir 217300 & 211662 - 100 Tórshavn - WWW.bilfridkan.fo



Toll- og Skattstova Føroya

# Málsviðgeri

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum.

Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita
• skattalógina
• tolllógina
• mvg-lógina
• kolvetnisskattalógina
• avgjaldslógirnar, eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Á Suðuroyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 11 starvsfólk.

*Lýsingin finst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo*

*E-mail: suduroy@tollskatt.fo*

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, er eitt starv leyst at søkja til setan 1. Apríl 2003.

**Høvuðsuppgávur:** Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv:** Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, og tað er ein fyrimunur at hava arbeiðsroyndir innan roknskap og bókhald. Viðkomandi skal vera fyrikomandi og arbeiðssamur og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða:**
• Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleika fyri eftirútbúgving,
• klokkuskipan við flextíð,
• eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir:** Løn- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Suðuroyar Øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Viðkomandi, ið settur verður, skal vera fúsur at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og skattstovan bjóðar, eitt nú merkonom , HD o.a. og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar.

**Nærri frágreiðing** fæst við at venda sær til Margret Joensen, Økisstjóra, á tlf. 37 10 51.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 17. februar 2003.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri

# CAFÉ NATÚR

# *Talentkvøld*

Mikukvøldið 29. januar klokkan 21:00

***"Talentkvøld" - Enn einaferð…***
***So royna vit aftur.***

Hevur tú tónlistarligar gávur og hug at royna teg, so kom og royn teg hjá okkum, vit hava "opna mikrofon".

Hetta er ikki ein kapping, bert ein møguleiki hjá tær/tykkum at royna tykkum á palli.
Eru tit einsamøll/einsamallur um títt/tykkara "talent" móst tú gjarna hava onkran við tær at t.d. spæla undir ella við.
Títt/tykkara "talent" kann verða sangur ella tónleikur av øllum slagi

Hevur tú spurningar/ivamál hesum viðvíkjandi ert tú vælkomin at ringja til Búa Dam á 267212.
*Tilmelding:* Tú kann fara oman á Café Natúr ella ringja 312625, har tú gevur teimum títt navn og telefonnummar. So ringir Búi aftur til tín áðrenn 29. januar.

CAFÉ NATÚR

FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN

# Fyrilestrar

Meðan Magnus Heinason ferðast kring landið og bjóðar framhaldsskúlanæmingum umborð at síggja skip, útgerð og úrslit, skipar Fiskirannsóknarstovan fyri almennum fyrilestrum, har Magnus Heinason vitjar.

Fyrilestrarnir byrja kl. 20.00 á hesum støðum:

| | |
|---|---|
| Í Miðvági | 27. jan. í Auluni í Miðvágs skúla |
| Í Runavík | 28. jan. í Býráðssalinum |
| Á Tvøroyri | 29. jan. í Tvøroyrar skúla |
| Í Klaksvík | 30. jan. í Atlantis |
| Í Tórshavn | 31. jan. á Fiskirannsóknarstovuni |
| Á Sandi | 3. februar í Virkinum |

Evnið er:

*– Hvat stýrir fiskaframleiðsluni á føroyska landgrunninum?*

Eisini verður greitt frá reiðskapsroyndum, har undirsjóvar filmar verða vístir.

Frá kl. 18.30 til fyrilestur byrjar eru fólk annars vælkomin at vitja umborð á Magnusi Heinasyni og síggja framsýningina.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

# Várframsýningin 2003

**verður í Listaskálanum 1. – 23. mars**

Øll eru vælkomin at senda inn listaverk til hesa framsýning, ið verður útvald og sett saman av eini dómsnevnd, ið felagið hevur sett.

Allar myndir skulu verða klárar at heingja upp. Pappírsmyndur skulu verða í glas og rammu.

Tilmeldingarblað fæst við at venda sær til Listasavn Føroya, postsmoga 1141, FO-110 Tórshavn, tlf. 313579, fax 316679.

Seinasta freist at lata inn listaverk til várframsýningina er sunnudagin 16. februar kl. 18$^{00}$.

**Felagið Føroysk Myndlistafólk**

Internet

Sosialurin www.sosialurin.fo